LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

**Umsókn um stuðul av játtanini til útoyggjamenning**

**- Høvuðskonta 14.37.2.19 Stuðul til útoyggjamenning -**

Áðrenn farið verður undir at fylla út umsóknarblaðið, eigur hjálagda vegleiðing at verða lisin. Um til ber, nýtið teldu til at fylla út umsóknarblaðið.

Umsóknarblaðið skal vera Løgmálaráðnum í hendi í seinasta lagi 1. februar í stuðulsárinum, uttan so at tað er lýst við aðrari freist á heimasíðu ráðsins og í bløðunum. Tá ið umsóknarblaðið er móttikið, kannar Løgmálaráðið um allar upplýsingar eru á blaðnum. Vanta upplýsingar, verður umsóknarblaðið sent umsøkjaranum aftur við áheitan um at fylla blaðið út av nýggjum innan eina ávísa tíðarfreist. Tá ið umsóknarfreistin er farin, ger umsitingin eitt tilmæli til landsstýrismannin um, hvussu peningurin á játtanini skal býtast ímillum umsøkjarar. Málið er, at øll fáa svar innan 14 dagar eftir, at umsóknarfreistin er farin.

Samstundis sum svar verða send umsøkjarum, verður á heimasíðuni hjá Løgmálaráðnum kunnað um, hvørjar verkætlanir hava fingið stuðul, hvat tær snúgva seg um, og hvør, ið hevur ábyrgdina av teimum. Hesar upplýsingar verða tiknir beinleiðis úr umsóknarblaðnum. Tað hevur stóran týdning, at umsøkjarar, sum hava fingið stuðul játtaðan, boða Løgmálaráðnum frá, um tað gerst teimum greitt, at tað ikki eydnast at nýta allan stuðulin í stuðulsárinum. Á henda hátt kann stuðulin koma øðrum umsøkjara til góðar. Orsakað av avmarkaðu upphæddini á játtanini, fáa vanliga fleiri umsøkjarar noktandi svar, enn játtandi.

Tá ið ein verkætlan er liðug, skal ein skrivlig frágreiðing um úrslitið av verkætlanini latast Løgmálaráðnum. Frágreiðingin skal latast inn sum skjal og helst eisini teldutøk. Í sambandi við útgjald av stuðli, hevur tað stóran týdning, at stuðulsmóttakarin skjalprógvar sínar útreiðslur. Legg til merkis: Bert skjalprógvaðar útreiðslur í stuðulsárinum verða endurgoldnar.

## 1. Heitið á verkætlanini

| |
|---|
| |

Heitið eigur at vera á føroyskum, og skal tað geva eina stutta og greiða lýsing av, hvat verkætlanin snýr seg um.

Gongin 7 • Postrúm 64 • FO-110 Tórshavn
Telf. +298 35 80 80 • T-postur: lmr@lmr.fo

**2. Navn, bústaður, telefon, teldupostur, umframt p-tal hjá persóni ella navn, bústaður, V-tal og kontunummar hjá virki, felagi ella kommunu**

Sjálvt um fleiri luttakarar eru í verkætlanini, skal ein ávísur persónur hava ábyrgdina og taka sær av samskiftinum við Løgmálaráðið.

**3. Aðrir luttakarar í verkætlanini**

Um aðrir luttakarar eru við í verkætlanini, skulu teir og teirra bústaðir lýsast í hesum teigi.

**4. Hvat er endamálið við verkætlanini**

Her skal greiðast frá, hvat endamálið við verkætlanini er, og hvat umsøkjarar vænta, at úrslitið kann nýtast til.

## 5. Hvussu er verkætlanin knýtt at endamálsgreinini í reglugerðini fyri játtanina

Her skal endamálið lýsast í mun til endamálsgreinina í reglugerðini. Hetta hevur sjálvandi stóran týdning, tá ið avgerð um stuðul skal takast.

## 6. Lýsing av hvussu verkætlanin verður framd

Hvussu verður ætlanin framd í verki, er talan um feltarbeiði, gransking, starvsstovukanningar, ferðing o.s.fr.

## 7. Nær byrjar og endar verkætlanin

Nær verður farið undir og nær endar arbeiðið. Stuðul kann bert latast til arbeiði, sum er framt í stuðulsárinum. Gongur verkætlanin yvir fleiri ár, má søkjast av nýggjum á hvørjum ári. At stuðul er latin í einum ári, er ikki trygd fyri at stuðul verður latin aftur komandi ár.

**8. Fíggjarætlan**

| | |
|---|---|
| **9. Útreiðslur til lønir:** | |
| **10. Útreiðslur til ferðing:** | |
| **11. Útreiðslur til vørur:** | |
| **12. Útreiðslur til tænastur:** | |
| **13. Aðrar útreiðslur:** | |
| **14. Útreiðslur samanlagt:** | |

| | |
|---|---|
| **15. Eginfígging:** | |
| **16. Fígging frá Løgmáláraðnum:** | |
| **17. Onnur fígging:** | |
| **18. Inntøkur samanlagt:** | |

Um fíggjarætlanin er meira útgreinað, enn umsóknarblaðið leggur upp til, kann ætlanin leggjast við sum fylgiskjal.

**19. Um verkætlanin gongur yvir fleiri ár, skal upplýsast, hvussu stóran stuðul ætlanin er at søkja um komandi árini**

| |
|---|
| |

Tað hevur týdning, at framhaldandi verkætlanir ikki leggja hald á ov stóran part av játtanini.

## 20. Hvussu og nær verður frágreiðing um úrslitið av verkætlanini latið Løgmálaráðnum

Løgmálaráðið leggur dent á, at úrslit av verkætlanum, sum ráðið hevur stuðlað, kann leggjast á heimasíðuna og vera tøk hjá almenninginum so skjótt sum gjørligt. Elektronisk frágreiðing um úrslitið av verkætlanini, skal latast Løgmálaráðnum í seinasta lagi 15. desember í stuðulsárinum. At lata frágreiðing inn seinni krevur avtalu við Løgmálaráðið.

## 21. Eru aðrar uppl. um verkætlanina, sum kunnu hava týdning fyri viðgerðina av umsóknini

Eru aðrar upplýsingar um verkætlanina, ið metast at vera viðkomandi fyri støðutakanina hjá Løgmálaráðnum, um so er stuðul skal veitast, kunnu teir skrivast í henda teig.

## 22. Hvussu nógv fylgiskjøl eru knýtt at umsóknarblaðnum

Eru fleiri upplýsingar enn tær, ið pláss er fyri á umsóknarblaðnum, kunnu tær leggjast við sum fylgiskjøl, sum skulu talmerkjast.

## 23. Váttan

**Staður** **Dagfesting** **Undirskrift**

Umsóknarblaðið skal váttast við staði, dagfesting og navni. Váttanin ber eisini boð um, at upplýsingarnar eru rættar.